Oyggjaleikirnir 1989:

Góðar umstøður í Føroyum

Aðalnevndin fyri Oyggjaleikunum er sera væl nøgd við tær umstøður ið vit hava at bjóða komandi oyggjaleikunum sum vera í Føroyum næsta summar

Le Vallee eer væl nøgdur við ítróttarmøguleikarnar í Føroyum

Herfyri var aðalnevndin fyri oyggjaleikunum í Føroyum og helt sín árliga nevndarfund. Samstundis fingu tey møguleikar at kunna seg um tær umstøður, sum eru her, at bjóða ítróttarfólki og øðrum. Bæði teimum føroysku og teimum, sum koma uttaneftir.

Deluty Owen Le Vallee, ovasti fyri oyggjaleikunum sigur seg vera sera væl nøgdan við umstøðurnar. Høllir og vøllir eru í finasta standi og somuleiðis er hann glaður fyri at síggja hvussu íðin ítróttarleiðarar og føroyska nevndin fyri oyggjaleikunum virka fyri, at alt skal fara fram á besta hátt. Og tað ivast hann ikki í at tað fer at gera.

Spurdur um hann heldur, at trupulleikar standast av, at leikirnir fara fram á ymiskum oyggjum sigur hann, at hetta hevur sjálvandi nakað av eyka arbeiðið og kostnaði vi sær. Nógv fleir hjálparfólk skulu til og meira ferðing verður eisini, men hann roknar tó ikki við, at hetta fer at hava serligar trupulleikar við sær. hann sigur, at tað hevur stóran týðning at tað hevur eydnast at fáa ítróttarfólki innivist í t.d. skúlum kring landið. hetta ger tað bíligari fyri ítróttarfólk. Um hesi bert høvdu hotell at gista á, hildu helst fleiri seg burtur, tí tað hevði verið ov dýrt fyri tey.

Eingin fimleikakapping

Flestu av ítróttargreinunum, sum vanligar eru við oyggjaleikir verða í Føroyum. Men tó ikki allar. Fimnleikurin verður møguliga við, men ikki sum kappingarítróttur. Tað er ikki møguligt millum annað tí, at ikki nóg nógv lond tekna seg við einum fimleikarliði.

Skipanin er so, at í minsta lagi fýra lond skulu tekna seg til ítróttargrein fyri at kappast kann í henni. Koma lond við fimleikarliði, og tað eru tey vælkomin til, verður hetta sum uppvísingarfimleikur, men tað er tó ikki vist, at tað verður minni undirhaldandi fyri tann skuld, sigur Le Vallee.

Skjótingin verður helst eisini nakað skerd. Leirdúgvuskjótingin verður við, og her hava vit góðar umstøður á Sandvíkum, men neyvan verður gjørligt at skjóta 300 metrar við riflu. Hetta krevur serliga breyt, sum vit ikki hava. Men annars eru møguleikar fyri flest øllum ítróttargreinum, sigur Le Vallee.

Stórur áhugi

At koma til Føroya er kanska eitt sindur trupult fyri onkran av oyggjabólkunum og heldur dýrt, men hetta tykist ikki at nerva tilmeldingaráhugan. hesin hevur verið stórur og aðalnevndin hevur bert fingið góð orð fyri, at komandi oyggjaleikirnir verða í Føroyum. Júst hvussu mong fara at tekna seg veit eingin fyrr enn 5. oktober tí tá er tilmeldingarfreistin úti.

Hørð men góð leið

Ítróttarvøll til frælsan ítrótt hava vit ongantið havt í Føroyum, men nú verður ein gjørdur á Toftum. Le Vallee heldur, at frælsi ítrótturin verður ein hin mest spennandi. hann ivast ikki í, at nógvir áskoðarar fara at koma, millum annað tí, at hetta er nýtt í Føroyum. Hann ivast heldur ikki í, at tá leikirnir eru av, fara nógvir føroyingar — eisini fólk, sum ikki áður hevur tikist við ítrótt — at venja frælsan ítrótt.

Ein onnur spennandi ítróttargrein verður súkklingin. Leiðin gongur úr Eysturoynni til Havnar. partar av leiðini eru ógvuliga brattir og hetta ger, at hetta verður ein ógvuliga hørð leið, men Le Vallee heldur at hon er góð og væl vald.

Føroyingar lítlan fyrimun?

Spurdur um hann heldur at føroysku súkklararnir hava ein ávísan fyrimun tí teir kenna leiðina og kunnu venja hana, sigur le Vallee, at tað hava teir møguliga. men, leggur hann aftrat, vit skulu ikki síggja burturfrá, at súkklarar aðrastaðir frá, liggja á einum ógvuliga høgum støði, uttan annars at taka nakað frá føroysku súkklarunum.

Serliga føroyska oyggjaleika-nevndin hevur annars alla praktisku ábyrgdina og Le Vallee er sera væl nøgdur við arbeiðið sum longu er gjørt og tær ætlanir sum liggja fyri framman.

— Oyggjaleiirnar fara tit at minnast í mong ár framyvir. teir eru ikki bert fyri ítróttarfólk, men fyri øll, leggur Le Vallee aftrat.

tór.-

Eyðkvæmislinjan hevur nú telefon
18820

Eyðkvæmislinjan

svarar alt samdøgrið á tlf. 18820.

Týsdagar kl. 16.00—18.00 fæst persónlig ráðgeving og serligir spurningar verða svaraðir.

Nýggjan útróðrarbát/alibát í 1988?

STARLETT og FÅBORG

Dømi um lán yvir 15 ár

Lánsupphædd: kr. 500.000,-
um mánaðin: kr. 4.750,-

Sera lagalig fígging

MOTOR MARINE Aps.
Tlf. 14629 ella 05152007, Telefax 05152343